**SERSTØK BYGGISAMTYKT MILLUM SKOTARÓK OG OYGGJARVEGIN**
SB_Tórshavn_Skotarók_2024_2026

Við heimild í løgtingslóg um býarskipanir og byggisamtyktir frá 21. mai 1954, verða skipaðar hesar reglur fyri tað øki í Tórshavnar kommunu, ið nevnt er í 1. grein.

Ætlanin við hesi serstøku byggisamtyktini er, at skipa íbúðarbygging fyri økið millum Skotarók og Oyggjarvegin. Økið skal skipast sum ein heild, og byggjast skal við virðing fyri lendinum, soleiðis at útsýni og nøktandi ljósviðurskifti kunnu tryggjast til eitt fjølbroytt útboð av bústaðareindum.

Fylgiskjal 1, 2 og 3 eru partur av hesi byggisamtykt.

## **§ 1. ØKI SAMTYKTARINNAR**

Stk. 1. Økið, ið serstaka byggisamtykin er galdandi fyri, er avmarkað, sum sýnt er á viðfesta fylgiskjali 1, og fevnir um matr. nr. 1233a, 1233b, 1378 og 1235a, Tórshavn og allar jarðarlutir, sum eir góðkenning av hesi byggisamtykt verða frábýttir ella samanlagdir nevndu ogn.

## **§ 2. ENDAMÁL OG HEIMILD**

Stk. 1. Endamálið við hesi serstøku byggisamtyktini, er at skipa bústaðarbygging, soleiðis at bygt verður í økjunum A og B, sum víst í fylgiskjali 2.

Stk. 2. Økið liggur í umráðispartinum A1 í almennu byggisamtyktini fyri Tórshavnar kommunu, sum er ætlað til bústaðir.

Stk 3. Sambært kapitul 2 § 5 í almennu byggisamtyktini fyri Tórshavnar kommunu er ásett fyri A1 øki, at: Í serstakari byggisamtykt kann, fyri eitt natúrligt avmarkað øki, verða loyvt at byggja íbúðir.

Stk. 4. Fyri viðurskifti, sum ikki eru regulerað í hesi serstøku byggisamtykt, eru ásetingarnar í almennu byggisamtyktini fyri Tórshavnar kommunu galdandi.

## **§ 3. NÝTSLA ØKISINS**

Stk. 1. Á økinum, sum serstaka byggisamtyktin fevnir um, kunnu byggjast íbúðir, felags hentleikar til íbúgvarnar og annars tað sum verður loyvt í almennu byggisamtyktini fyri umráðispartin A1.

## **§3. BYGGING, STØDD OG STAÐSETING**

Stk. 1. Bygging er bert loyvd á øki A og øki B, sum sýnt í fylgiskjali 2.

Stk. 2. Mest loyvda byggistig er 0,30.

Stk. 3. Mest loyvda nýtslustig 0,70.

Stk. 4. Samlaða longdin á hvørjum íbúðarbygningi skal ikki vera meira enn 50 m.

UPPSKOT

Stk. 5. Framsíður skulu sniðgevast við forskotnum veggjum og innvikum. Forskjótingar/innvik skulu gerast fyri hvørjar 20 m. Forskjótingin/innvikið skal vera í minsta lagi 0,5 m. Áhongdir bygningslutir eru ikki at meta sum forskjóting/innvik.

Stk. 6. Longra framsíða skal fylgja vegnum, sum sýnt í fylgiskjali 3.

Stk. 7. Fyri øki A skulu hús ikki vera hægri enn 9 m til mønuna. Á stytru framsíðu (framsíður, ið venda norður/suður) er ikki loyvt at byggja hægri enn 7 m til hægsta punkt á útveggi.

Stk 8. Fyri øki B skulu hús ikki vera hægri enn 15,5 m til mønuna. Á stytru framsíðu (framsíður, ið venda norður/suður) er ikki loyvt at byggja hægri enn 10 m til hægsta punkt á útveggi.

Stk. 9. Hús skulu byggjast við mønu ella einvegis takhalli, sum sýnt í fylgiskjali 3.

Stk. 10.Takhallið skal vera í minsta lagi 10 gradir.

Stk. 11. Tekja við styttru framsíðu (framsíður, ið venda norður/suður) skal skráa niður móti millumrúmið til aðra bygging, sum sýnt í fylgiskjali 3.

Stk. 12. Felagshøli til íbúgvar í økinum skal gerast, og skal hetta vera minst 4 $m^2$ fyri hvørja íbúð.

## § 4. VEGIR

Stk. 1. Vegir skulu gerast sambært ásetingum í almennu byggisamtyktini fyri Tórshavnar kommunu.

## § 5. ÚTSJÓND

Stk. 1. Øll bygging í økinum, sum byggisamtyktin fevnir um, skal gerast í samráð við byggimyndugleikan.

Stk. 2. Kommunan skilar sær rætt at seta krøv til útsjónd av bygningum í sambandi við nýbygging, út- og umbygging.

## §6. BYGGIMYNDUGLEIKI OG ÁTALURÆTTUR

Stk. 1. Byggimyndugleiki og átalurættur eru sambært hesi byggisamtykt hjá Tórshavnar býráð einsamøllum.

## § 7. UNDANTAKSLOYVI FRÁ BYGGISAMTYKTINI OG BROYTINGAR

Stk. 1. Smávegis lættar frá reglunum í hesi byggisamtykt kann byggivaldið geva loyvi til, um so er, at dámurin á økinum, sum byggisamtyktin roynir at skapa ella varðveita, ikki verður broyttur av teirri orsøk.

Stk. 2. Broytingar í byggisamtyktini kunnu verða gjørdar eftir samtykt býráðsins og góðkenning landsstýrisins eftir reglum um samtykt og góðkenning av nýggjum byggisamtyktum.

UPPSKOT




## Tórshavnar Kommuna
**Býarskipanardeildin**

| | | | | | |
|---|---|---|---|---|---|
| **Heiti** | Serstøk byggisamtykt fyri matr. nr. 1233a, 1233b, 1378 og 1235a | | | | |
| **Undirheiti** | Fylgiskjal 1 | | | | |
| **Mát** | 1:1000 | | | | |
| **Dagur** | 26.03.2024 | **Journal** | 22/07222 | **Teknað** | RSB |




| Serstøk byggisamtykt fyri matr. nr. 1233a, 1233b, 1378 og 1235a | |
|---|---|
| Fylgiskjal 2 | Støðumynd / 1:2000 / A4 |
| TÓRSHAVNAR KOMMUNA Býarskipanardeildin - 01.09.2026 | |
| Mynd: 1 av 1 | Teknað: JL |






**Serstøk byggisamtykt fyri matr. nr. 1233a, 1233b, 1378 og 1235a**

Fylgiskjal 3

TÓRSHAVNAR KOMMUNA Býarskipanardeildin - 18.12.2025